**Nr. 109/2019**

**Heðin Mortensen**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur viðvíkjandi málsviðgerð hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Metir løgmaður, at tað ber til at hava álit á landsstýrismanninum í fíggjarmálum, soleiðis sum hann kolldømdi sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið?
2. Metir løgmaður, at gongdin í málinum higartil bendir á, at landsstýrismaðurin, sum evsti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum, hevur hildið seg til endamálið við § 5, stk. 5 í Kommunustýrislógini?

**Viðmerkingar:**
Jørgen Niclasen, fíggjarmálaráðharri, hevur kolldømt sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Kommunufelagið finst í almennum skrivi hvassliga at avgerðini og sigur millum annað, at avgerðin ikki einans er í stríði við alla siðvenju á økinum, men eisini er beinleiðis í andsøgn við greitt orðaða endamálið við § 5 í Kommunustýrislógini.[1] Endamálið við hesi greinini er, at landsstýrismaðurin skal tryggja javna millum lønarlagið hjá landinum og kommununum.[2] Kortini hevur landsstýrismaðurin valt at kolldøma sáttmálan. Hetta hóast sáttmálin gevur starvsfólki hjá kommununum nett sama lønarvøkstur sum starvsfólki hjá landinum.
Kolldømingin av sáttmálanum kom tvey samdøgur eftir, at partarnir høvdu undirskrivað sáttmálan.[3] Landsstýrismaðurin hevur enn ikki svarað formligu atfinningunum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, men hevur biðið um longda freist at svara.
Meðan bíðað verður eftir svari frá landsstýrismanninum, hevði verið gott at fingið greiðu á hesum málinum. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

**Á Løgtingi, 19. juni 2020**

Heðin Mortensen

---

[1] Kommunufelagið, 10.06.20, http://www.kf.fo/figgjarmalara%C3%B0harrin-brytur-styrisskipanarlogina-og-kommunustyrislogina

[2] Uppskot til løgtingslóg um kommunustýri, s. 19, serligar viðmerkingar til §5, https://www.logting.fo/files/casestate/8503/082.99%20um%20kommunulogina.pdf

[3] Kringvarp Føroya 05.06.20, https://kvf.fo/greinar/2020/06/05/godkennir-ikki-sattmalan